## Henke verður venjari

Sambært svenska Aftonbladet verður Henrik Larsson nú høvuðspersónur í einum óvanligum skifti í svenskum fótbólti. Blaðið skrivar nevnliga, at spælarin, sum í ár endaði drúgvu yrkisleið sína, nú verður venjari hjá Landskrona Bois, sum spælir í næstbestu svensku deildini. Eitt skifti, sum ikki gerst minni óvanligt, tá Landskrona er grannafelagið hjá Helsingborg, har Henke fekk sítt gjøgnumbrot.



## Lotus aftur í Formel-1

Enska Lotus, sum í 80'unum taldist millum sterkastu feløgini í Formel-1, er nú aftur á veg inn í ítróttina. Við malaysiskum milliónum í rygginum skal Lotus á kortið til komandi kapping, og tað verður ikki við mýkindum, siga eigararnir. Soleiðis kundi felagið um vikuskiftið boða frá, at Jarno Trulli og Heikki Kovalainen verða teir, sum skulu koyra bilarnar komandi ár. Lotus er eitt av fýra nýggjum liðum í Formel-1 komandi kappingarár.

## Vóru kanska bangnar

– Hetta var spennandi og nervapirrandi, men tað var keðiligt, at vit ikki skuldu klára tað. Kanska var munurin, at tær í SÍ eru vanar við at vinna, meðan vit kanska vóru bangnar, segði liðformaðurin hjá Mjølnir, Eina Kalsø.

Hon hevur tó ikki mist allar vónir, hóast tað ikki gekk ímóti SÍ hesa ferð, og hon segði, at tær í Mjølnir framvegis trúgva upp á framhaldandi framstig og eisini ætla sær at koppa SÍ til síðst.

– Sjálvt um vit taptu í dag, so spældu vit ein góðan dyst, og tí kunnu vit ikki vera ov keddar, men mugu bara koma aftur. Sum støðan sær út nú, gjørdi tað kanska ikki so nógv, at vit taptu fyri SÍ, men øll hini liðini eru eisini góð, so nú mugu vit bara royna at vinna á øllum, segði Eina Kalsø.

**hil**

## Gjørdu tað strævið

– Tað var ræðuliga tungt í byrjanini, men vit funnu spælið aftur ímóti endanum. Vit gjørdu tað strævið fyri okkum sjálvar, men vit vistu, at vit kundu spæla betur og at vit eisini kundu koma afturíaftur. Vit vildu vinna og tað gjørdu vit eisini.

Tað segði Annika á Stongum, liðskipari hjá SÍ, eftir at drúgvi fimmsettarin ímóti Mjølnir var av.

– Hetta var dysturin, vit hava bíðað eftir leingi, og tað var deiligt at fáa mótstøðu. Nú vita vit, at tað eru onkur lið, sum vilja berjast fyri at vinna á okkum, og Mjølnir spældi veruliga væl í dag.

Annika segði seg vænta, at tað verður Mjølnir, ið kemur at geva SÍ harðastu mótstøðuna víðari í kappingini, og hon helt, at tað væl kundi hugsast, at tað júst verða SÍ og Mjølnir, sum í vár skulu spæla FM-finalurnar, tá kappingin er komin so langt.

**hil**



# Mjølnir mundi tikið SÍ

**Fimm sett máttu til, áðrenn sørvágskvinnur kundu kanna sær sigurin í Klaksvík, har tær megin-partin av fimta setti vóru aftanfyri og tí tað sama kundu tapt**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

**Mjølnir-SÍ 2-3**
(25-20, 25-23, 22-25, 16-25, 15-17)

Higartil eru 30 dystir spældir í Eikliguni hjá kvinnum, men synd er at siga, at nógvir teirra hava verið spennandi. Undantakið var dysturin í Badmintonhøllini í Klaksvík í gjár, sum endaði við at gerast bert annar fimmsettarin í kvinnukappingini higartil.

Mjølnir, sum leingi hevur ligið og andað SÍ í nakkan, tók ímóti oddaliðnum, ið undan hesum dystinum ikki enn hevði tapt – og enntá bara hevði sett eitt sett til í teimum átta undanfarnu dystunum!

Samstundis sum fleiri av liðunum niðanfyri hava havt hug at nærkast, lá helst eitt sindur størri trýst á herðunum á klaksvíkskvinnunum, ið hava tikið seg støðugt fram. Men tað skuldi vísa seg, at á vøllinum sóu tær hjá SÍ meira út til at vera niðurboygdar av trýsti.

Alt kappingarárið hava tær bíðað eftir, at okkurt av hinum liðunum av álvara fór at geva teimum mótstøðu. Og tá tað so endiliga hendi, kom tað dátt við, tí SÍ sá fyri ein stóran part ikki út til at hava munin á Mjølnir – og tað var eisini um reppið, at SÍ tapti.

Í fyrsta setti legði Mjølnir bragdliga út og kom á odda 18-13, áðrenn SÍ svaraði aftur og kom upp á 19-19, tá Mjølnir raknaði við aftur og koyrdi setti heim. Hinvegin var SÍ sannførandi á odda heili 17-11 í øðrum setti, men megnaði allíkavæl at tapa tað.

### Bardu seg innaftur

Í teimum báðum fyrstu settunum var dysturin nógv merktur av, at liðini stríddust um hvønn einasta bólt, og so var eisini í triðja setti, tá SÍ hevði settbólt við leiðsluni 24-17, men tó mátti bíða fimm bóltar, áðrenn settið varð vunnið. Í fjórða setti var SÍ á odda allan vegin og vann greitt.

Serliga vóru kvinnurnar báðu megin netið ídnar á gólvinum, har allar ofraðu seg heilhjartað fyri at fáa bóltarnar uppaftur, og av tí sama spurdust eisini fleiri góðar duellir